# 10 ár

Í dag er støðan hon, at berghitaskipanir taka millum 67 og 75% av hitaorkuni úr umhvørvinum. Restin av orkuni kemur frá elveiting.

Hetta merkir millum annað, at eini vanlig sethús sum brúka jarðarhita heldur enn oljufýr, lata millum 3 og 10 tons minni av $CO_2$ út um árið, alt eftir, um elframleiðslan er við olju ella við vatni/vindi.

Hetta merkir haraftrat, at meiríløgan í eina berghitaskipan, við verandi oljuprísum og elprísum, kann sparast inn aftur eftir umleið 10 árum.

*(Kelda: jarðfeingi.fo)*

# Áhugi

At eini ung hjún velja eina nýggja og umhvørvisvinarliga hitaloysn, skapar sjálvandi almennan áhuga.

Tey vóru nakað herfyri umrødd í sjónvarpinum, og eftir tað sóust fleiri fremmandir bilar koyra í Sørpum fyri at hyggja eftir húsum teirra.

Men har var sjálvandi ikki nógv at síggja, tí bæði borihol, jørðslangur og alt annað er annaðhvørt undir jørð, og øll tann tekniska útgerðin innanveggja.

Fólk vóru kortini forvitin eftir at frætta um alt hetta við berghitanum. Hetta merkti Edith eisini ein dagin, hon var farin til handils.

- Eg møtti tá eini kvinnu, sum kom yvir til mín og spurdi meg, hvussu berghitin riggaði. Eg svaraði bara, at tað riggaði sera væl, og so prátaðu vit um tað, greiðir Edith frá.

Onkur hevur eisini verið á gátt fyri at fáa nærri kunnleika um nýggju skipanina. Tí er ikki óhugsandi, at mong onnur fara at gera sum Edith og Jarnhold Nattestad.



**(Ó)VANLIG SETHÚS**

*Uttan síggja tey út sum so mong onnur sethús, men innan er stórur munur á. Húsini hjá Jarnhold Nattestad eru upphitað við berghita, og liggja útreiðslurnar til hita og brúksvatn uppá 700 krónur um mánaðin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




**»** **Eg havi ongatíð verið bangin fyri at royna okkurt nýtt og øðrvísi. So hetta var bara ein spennandi avbjóðing fyri meg, at kunn hita okkara hús upp við berghita**

**»** **Elnýtslan hevur verið á góðum støði, og útreiðslurnar til vatn og hita liggja um 700 krónur um mánaðin. So tað er ikki so galið**

# 130.000 kr.

Í september mánaði setti tingmaðurin, Kári P. Højgaard nakrar fyrispurningar til vinnumálaráðharran, Johan Dahl viðvíkjandi jarðhitaskipan.

4. oktober gav Johan Dahl honum hetta svar uppá fyrsta spurningin:

- Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvørjir partar av vinnuni eru hoyrd, viðvíkjandi jarðhitaskipanum í Føroyum?

Johan Dahl svarar: - Í løtuni verður arbeitt við at gera eina lóg um berghita. Lógin verður skjótt klár at fara til hoyringar og tá verður vinnan eisini hoyrd. Endamálið við lógini um berghita er at fáa skipað viðurskifti soleiðis, at atlit verða tikin til umhvørvið, brúkaran, býarplanlegging og marknaðin.

Sum nú er, eru ongar reglur á hesum økinum og tá vit fyrr í ár kannaðu hesi viðurskifti, eru vit komin til ta niðurstøðu, at tað stendur einum og hvørjum frítt at bora 150-200 metrar niður í jørðina á egnum grundstykki. Jarðhitaskipanir eru nú einaferð soleiðis háttaðar, at um tær verða dimensioneraðar rætt og at fakkunnleikin er til staðar hjá teimum, sum gera arbeiðið t.e. brunnborarar og installatørar, kunnu jarðhitaskipanir veruliga gera mun fyri umhvørvið ($Co_2$) og samstundis vera ein hitaskipan, sum er bíligari at reka enn t.d. upphiting við oljufýri. Mett verður, at er ein jarðhitaskipan ikki dimensioneráð og installerað rætt, verður hon ineffektiv og hevur ikki tey jaligu árin á umhvørvið. Tí mettu vit, at tað var neyðugt at løggeva á hesum øki. Haraftrat er ein jarðhitaskipan mett at kosta um kr. 130.000 og hetta er ein stórur íløga hjá einum húski.

*(Kelda: logting.fo)*